## Ísland betur uttan ES

Millum teir íslendingar, sum eru ímóti at fara upp í Evropasamveldið, er fiskimálaráðharrin, Jón Bjarnason. Tað duldi hann heldur ikki, tá hann í síðstu viku var røðari á einari útróðrarráðstevnu í Fraklandi. Hann greiddi frá hvussu íslendska fiskivinnan er skipað, og at íslendskir myndugleikar leggja stóran dent á, at fiskivinnan skal vera burðardygg. Um umsóknina um limaskap í ES segði Jón Bjarnason, at hann er sannførdur um, at tað er betur fyri Ísland sum fiskivinnutjóð at standa uttan fyri Evropasamveldið.



## Lond krevja ávirkan

Danmark og hini ídnaðarlondini sleppa ikki at stýra gongdini á veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn. Á fundi í Beijing um vikuskiftið samdust umboð fyri Kina, India, Suðurafrika og Brasil um, at londini fara at taka seg burtur úr tingingunum, fáa tey ikki undirtøku fyri nøkrum krøvum, sum tey hava, og sum eru ófrávíkilig. Tað segði indiski umhvørvismálaráðharrin í gjár. Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri, sigur við DR, at boðini frá londunum eru helst ein roynd at gera vart við, at tey hava eisini krøv við sær til Keypmannahavnar. Hann heldur ikki, at talan er um nakra beinleiðis hóttan.

# - Vit lærdu at spjaða okku

**- Undir kreppuni í Føroyum fyrst í nítiárunum sóu vit, hvussu stórur váðin er at binda ein ov stóran part av pensjónskapitalinum her heima, tí sveiggini í búskapinum kunnu vera so stór, segði Tummas Eliasen, stjóri í LÍV á vinnutinginum hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag í Fuglafirði. Hann eftirlýsti annars ein meira málrættaðan vinnulívspolitiskan karm í Føroyum**



*- Sveiggini í føroyskum búskapi kunnu vera stór, og vit sóu undir kreppuni fyrst í nítiárunum, at tað kann hava ov stóran váða við sær at binda ov stóran part av pensjónskapitalinum í Føroyum, segði Tummas Eliasen, stjóri í LÍV og í íløgufelagnum Royndini*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

PENSJÓNSKAPITALUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í vinnutinginum, sum Eysturoyar Vinnulívsfelag skipaði fyri á Vónini næstsíðsta fríggjadag, greiddi Tummas Eliasen, stjóri í LÍV og í íløgufelagnum Royndini frá eftirlønartryggingum og um pensjónskapital í vinnulívi.

Tummas segði, at hann síðan á vári 1987 hevur arbeitt við pensjónum, og nú eftir 22 árum hevur hann høvuðsábyrgdina av at umsita 2,8 miljardir krónur í pensjónskapitali.

- Samlaði føroyski kapitalurin innan eftirlønartryggingar er einar 4,5-5 miljardir krónur, harav LÍV umsitir nevndu 2,8 miljardirnar. Inngjøldini, sum fella í okkara part, eru umleið 324 miljónir krónur um árið.

Hann segði, at samlaða A-inntøkan í Føroyum liggur um 7 miljardir krónur um árið, og við einum inngjaldsprosenti upp á 15%, hevði hetta svarað til 1.050 miljónir krónur.

Hann segði, at LÍV umsitir eftirløn og lívstrygging til størra partin av føroyska arbeiðsmarknaðin og umboðar flestu føroysku fakfeløgini.

- Sum størsti einstaki veitari á eftirlønarøkinum er Lív samstarvsfelagin, ið tryggjar framtíðar lívskorini hjá meirilutanum av føroyingum.

Tummas duldi ikki fyri, at hetta er ein ábyrgd, ið krevur serfrøði, trúvirði, opinleika og tryggleika.

- Hetta eru kjarnuvirðini, ið LÍV byggir á, segði hann.

### Spjaða váða

Stjórin í LÍV greiddi frá gongdini á pensjónsøkinum og segði, at eftir at alment lønt í sínum sáttmálum høvdu tryggjað sær pensjónsskipanir, breiddi gongdin seg eisini yvir á privata arbeiðsmarknaðin.

- Í sínari tíð var pensjón ein veiting. Nú gera fólk sjálvi íløgur í eftirløn og lívstryggingar og vilja hava eina ávirkan á hesi viðurskifti. Í dag eru at kalla øll arbeiðsfólk organiseraði og gjalda inn til pensjónir. Tey, sum enn ikki eru organiseraði, gjalda í stóran mun til sína privatu pensjón.

Tummas Eliasen segði, at alment lønt vanliga gjalda 15% av síni løn inn til eftirløn, meðan flestu, sum arbeiða á privata arbeiðsmarknaðinum, gjalda í minsta lagi 9%.

- Av teimum 2,8 miljardunum, vit umsita í dag, standa umleið 1,4 miljardir krónur í donskum lánsbrøvum, 20% í partabrøvum

> *... í sínari tíð var pensjón ein veiting. Nú gera fólk sjálvi íløgur í eftirløn og lívstryggingar og vilja hava ávirkan. Í dag eru at kalla øll arbeiðsfólk organiseraði og gjalda inn til pensjónir...*

> *... skulu vit røkka einum vinnuligum máli, má kósin setast, og so mugu vit stremba eftir málinum. Ein fyritreyt er, at vinnulívspolitisku karmarnir eru tryggir...*